Bentley Continental Flying Spur:

# Heimsins skjótasti sedan

**Nýggi Bentley Continental Flying Spur, við W12 motori og 560 hk, koyrir frá 0-100 km/t upp á 5,2 sekund, toppferðin er 312 km/t, og bilurin vigar 2,5 tons. Talan er um heimsins skjótasta sedan**

BILAR

*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Í mong ár vóru Bentley og Rolls-Royce so gott sum somu bilar. Bentley var sportsliga útgávan av Rolls-Royce. Í dag hoyra Rolls-Royce til BMW, og Bentley til VW-konsernina.

Í hesum mánaðinum kemur ein heilt nýggjur Bentley Continental Flying Spur á marknaðin. Bilurin vigar 2,5 tons, hevur W12 motor við tveimum turboløðarum og 560 hk. Hann koyrir frá 0-100 km/t upp á 5,2 sekund, og toppferðin er 312 km/t.

Skivubremsurnar eru tær størstu, sum nakrantíð eru gjørdar til ein standardbil. Hann hevur t.d luftfjaðraskipan og verður drivin av øllum fýra hjólunum.

Bentley Continental Flying Spur er útgjørdur við øllum tí nýggjasta, sum finst innan kabinuteknologi - har manglar einki. Designið innan er ein blandingur av gomlum enskum stíli og tí heilt nýggja. Nakað sum vit t.d. kenna frá Rover 75.

Enn verða Bentley framvegis gjørdir í Onglandi, men ætlanir eru frammi um at flyta partar av framleiðsluni til eina VW-verksmiðju Dresden í Týsklandi, har t.d. luksusbilurin VW Phaeton verður gjørdur.

Í Danmark kostar ein Bentley Continental Flying Spur umleið 3,7 mill. krónur. Uttan avgjøld er prísurin 1.090.000,-.




*Nýggi Bentley Continental Flying Spur við W12 motori og 560 hk*




*Designið er elegant og smart. Bentley Continental Flying Spur er heimsins skjótasti sedan*



*Útgávan við 4 sitiplássum og gardanboks millum setrini.*



*Bentley Continental Flying Spur er útgjørdur við øllum tí nýggjasta, sum finst innan kabinuteknologi - har manglar einki*

## Bentley Continental Flying Spur

| | |
|---|---|
| Motorurin | 6,0 litur W12 48V 560 hk bensin v. biturbo |
| 0-100 km/t | 5,2 sek |
| Toppferð | 312 km/t |
| Dekkstødd | 275/40-19Z |

<u>Stødd og vekt</u>

| | |
|---|---|
| Longd | 531,0 cm |
| Breidd | 212,0 cm |
| Hædd | 148,0 cm |
| Eginvekt | 2.475 kg |
| Viðførisrúm | 475 litrar |
| Prísur | umleið kr. 3.700.000,- (í Danmark) |